MENTAMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Children, Education, Research and Culture

# Landsroyndin 2026

Próv STOVAN NÁM

**Landsroyndin 2026**

Eftir galdandi lóggávu hevur landsstýrisfólkið við skúlamálum ábyrgdina av at skipa fyri landsroyndum í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni í 4. og 6. flokki, hendan uppgávan er løgd til Próvstovuna at fyriskipa. Hetta verður gjørt í góðum samstarvi við skúlarnar.

Í ár var landsroyndin hildin í døgunum 14. – 17. apríl, og gekk tað væl at fáa hana avgreidda.

4. flokkur er til roynd í fýra pørtum: Lesing 45 min., stavseting 45 min., støddfrøði 45 min. og náttúra og tøkni 45 min. 6. flokkur er til roynd í fimm pørtum: Lesing 45 min., stavseting 45 min., mállæra 30 min., støddfrøði 60 min. og náttúra og tøkni 60 min. Miðað verður eftir, at royndirnar ávirka gerandisdagin minst møguligt. Skúlin skipar karmarnar kring royndina, soleiðis at næmingarnir kenna seg tryggar, t.d. at royndin er í flokshølinum, og at lærarin í lærugreinini er hjástaddur. Próvstovan hevur lagt seg eftir, at tað skal vera góð tíð hjá næminginum at finna seg til rættis, tí byrjar royndin í 4. flokki kl. 8.15, og ein heilur tími er lagdur millum royndirnar hjá 4. og 6. flokki.

Skúlarnir fáa atgongd til fyribils úrslitini hjá sínum næmingum beinanvegin. Hesi úrslit skulu tó takast við fyrivarni, tí øll svarini verða eftirhugd og kunnu broytingar tí fyrikoma. Tá royndirnar eru lidnar, og skúlarnir hava fingið síni úrslit, verða samlaðu úrslitini fyri landið kunngjørd saman við einari frágreiðing.

Miðalúrslitið er lýst í % av samlaða uppgávusvarinum. Tað vil siga, at um eitt avrik verður víst sum 60%, so eru 60% av svarunum røtt. Tað er týdningarmikið at hava í huga, at endamálið er ikki at geva næmingunum eitt talmet, og skulu hesi tøl tí setast í mun til tað, sum næmingarnir megna.

Miðalúrslitið í ymsu lærugreinunum í ár er hetta:

**Royndarúrslit 4. flokkur:**

| Lærugrein | Miðalúrslit |
|---|---|
| Føroyskt, lesing | 79% |
| Føroyskt, stavseting | 82% |
| Støddfrøði | 69% |
| Náttúra og tøkni | 60% |

**Royndarúrslit 6. flokkur:**

| Lærugrein | Miðalúrslit |
|---|---|
| Føroyskt, lesing | 64% |
| Føroyskt, stavseting | 81% |
| Føroyskt, málllæra | 65% |
| Støddfrøði | 51% |
| Náttúra og tøkni | 70% |

**Landsroyndir eitt eftirmetingaramboð**

Høvuðsendamálið við landsroyndunum er at geva skúlunum eina mynd av, hvussu væl næmingarnir megna førleikakrøvini í teimum útvaldu lærugreinunum. Royndirnar eru eitt amboð hjá lærarum og skúlum at fáa innlit í læringina hjá næmingunum og harvið skapa betri grundarlag fyri at leggja undirvísingina til rættis.

Við landsroyndunum fáa lærarar og skúlaleiðsla upplýsingar um styrkir og avbjóðingar hjá bæði einstaka næminginum, flokkinum og skúlanum sum heild. Hesar upplýsingar kunnu nýtast sum partur av tí støðugu eftirmetingini, sum fer fram í skúlanum, og kunnu hjálpa til at eyðmerkja øki, har tørvur er á serligum átøkum ella tillagingum í undirvísingini.

Týdningarmikið er tó at siga, at landsroyndarúrslitini eiga ikki at verða sædd sum ein fullfíggjað meting av førleikunum hjá næmingunum. Tey eru bert eitt av fleiri amboðum í eftirmetingar-arbeiðinum og mugu tí tulkast saman við dagligum eygleiðingum, uppgávum, samrøðum og øðrum metingum, sum lærarin ger gjøgnum skúlaárið.

Endamálið er, at landsroyndin stuðlar undir eina meira miðvísa menning av undirvísingini. Við at greina úrslitini kunnu lærarar og skúlaleiðsla taka fakliga grundaðar avgerðir um, hvussu undirvísingin kann skipast, tillagast og styrkjast, soleiðis at hon á bestan hátt møtir tørvinum hjá næmingunum.

Tá eygleiðingar, arbeiðsuppgávur og metingar, sum verða gjørdar gjøgnum skúlaárið, verða lagdar afturat landsroyndarúrslitinum gevur tað lærarum eitt eyka bein at standa á í mun til eftirmeting og greining av gongdini og úrtøkuni hjá næmingunum og flokkinum.

Við góðum hagtølum fær leiðslan eitt amboð, har hon skjótt kann seta seg inn í, hvussu gongdin hjá skúlanum er. Hon kann fylgja gongdini og meta um, hvat yvirskipað kann gerast fyri at halda góðu gongdini ella at betra um teir partar, ið ikki ganga væl.

Próvstovan arbeiðir miðvíst við at betra um hagtølini, ið skúlarnir fáa, hetta soleiðis at landsroyndirnar ikki bert hava eitt skjalfestandi endamál, men eisini eitt menningarorienterað endamál. Eitt amboð, ið stuðlar arbeiðinum, sum longu verður gjørt á skúlunum, ein partur av arbeiðinum at fremja dygdargóða undirvísingini og styrkja eftirmetingarmenningina á einstøku skúlunum.